PART TWO
SOAKED IN LUXURY
minimum
MISS SIXTY
InWear
Levi's LEVI STRAUSS & CO.
BRUBAKER
COTTONFIELD
Matinique
G-STAR RAW
SisterS point
DIESEL FOR SUCCESSFUL LIVING
FREOLI
J.LINDEBERG STOCKHOLM

SALE

Stóra vetrarútsølan byrjar mánadagin 7/1 kl. 10

HARRAR - DAMUR - Deres

Handilskjarnin

## Sølufólk/ráðgevi til verkætlanir

Tú skalt í hesum starvi vitja verandi kundar og søkja upp nýggjar. Kundar tínir eru arkitektar, verkfrøðingar, skúlar, kommunur, stovnar og onnur, ið hava tørv á innbúgvi og ráðgeving í sambandi við innrætting av skrivstovum, skúlum og stovnum – nýggjum sum gomlum.

Tú verður okkara andlit úteftir. Vit vænta tí, at tú ert fryntlig/ur, røkin, álítandi, ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt við stórum verkætlanum.

**Vit vænta, at tú:**
- hevur skipaða tilgond til uppgávur og avbjóðingar.
- hevur nøktandi KT-kunnleika.
- ert sølu- og tænastusinnað/ur
- ert ein liðspælari
- ert íðin og áhaldin í uppgávum.

Neyðuga upplæring fært tú frá okkum, men hevur tú læru og royndir innan sølu, kann hetta vera tær til fyrimuns. Koyrikort er ein treyt.

Tú fært eitt spennandi starv, við nógvum avbjóðingum fyri framman, í stuttligum, avbjóðandi og mennandi søluumhvørvi, saman við dugnaligum og ágrýtnum starvsfelagum.

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta fólkinum. Starvið er eitt fultíðarstarv.

Løn eftir avtalu.

Umsókn við CV, prógvum og viðmælum skal verða okkum í hendi innan 11. januar 2008.

Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.

## Skrivstovusamskipari

Starvið er tilrættalegging av eitt nú ordramóttøku, back- up hjá sølufólkum, bílegging, útflýggjan og tolling. Ávís starvsøki koma undir tín ábyrgd.

Tú hevur lætt við at tosa við fólk, ert røkin, fryntlig/ur, álítandi og ágrýtin.

**Vit vænta, at tú:**
- hevur skipaða tilgong til uppgávur og avbjóðingar.
- hevur hollan KT-kunnleika.
- ert sølu- og tænastusinnað/ur mótvegis kundum og veitarum.
- dugir at gera handilsmannagongdir einklar og smidligar.
- varðveitir yvirlitið, tá ið harðast leikar á.
- ert ein liðspælari
- ert stigtakandi, íðin og áhaldin í átøkum og uppgávum.

Tú fært eitt spennandi starv í stuttligum, avbjóðandi og mennandi søluumhvørvi, saman við dugnaligum og ágrýtnum starvfelagum.

Starvið verður sett 3. mars 2008 og er eitt fultíðarstarv.

Løn eftir avtalu

Umsókn við CV, prógvum og viðmælum skal verða okkum í hendi innan 18. januar 2008.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði

## Heilsølunæmingur

Hevur tú hug at læra frá teimum bestu, er hetta rætta starvið fyri teg. Tú gerst partur av einari slóðbrótandi heilsølu í støðari menning.

Tú fært eitt spennandi lærupláss við nógvum avbjóðingum fyri framman, í stuttligum og mennandi søluumhvørvi, saman við dugnaligum og ágrýtnum starvfelagum.

Tú verður ein av okkara. Vit vænta tí, at tú ert ábyrgdarfull/ur, røkin, álítandi, ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit vænta, at tú:**
- hevur eina miðnámsútbúgving
- hevur nøktandi KT-kunnleika
- ert sølu- og tænastusinnað/ur
- ert ein liðspælari
- ert fryntlig/ur, íðin og áhaldin í uppgávum

Lærutíðin er 2-3 ár, alt eftir útbúgving og fevnir um skúlaskeið uttanlands. Tú fært eisini serliga upplæring frá okkum og okkara veitarum og samstarvsfelagum uttanlands.

Løn eftir nærri avtalu.

Umsókn við CV, prógvum og viðmælum skal verða okkum í hendi innan 18. januar 2008.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Blika

**Umsóknir skulu sendast til:**
Blika spf., postrúm 316, 110 Tórshavn ella beinir@blika.fo. Vilt tú vita meira um størvini, kanst tú ringja til Beinir á tlf. 556666.

BLIKA SPF · AKRANESGØTA 9 · TÓRSHAVN · TELEFON 35 6666 · TELEFAX 35 6667 · T-POST: BLIKA@BLIKA.FO · WWW.BLIKA.FO